tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Býráðið

Fundur nummar	13-2018
Fundardagur	10. september 2018 kl. 19:00
Fundarstaður	Býráðsskrivstovan

Møtt: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Súsanna Bertholdsen, Annika Pearce, ið møtir fyri Boga Johannesen og Kristina Roest. Kristina Roest fer av fundinum vegna ógengni áðrenn viðgerðin av pkt. 15 byrjar og Anfinn Leo, varalimur luttekur á restini av fundinum.
Skrivari:

Yvirlit yvir mál til viðgerðar

Pkt.	Tekstur	Síða
1	Samanbering av skattatølum 2018	3
2	Parkeringsskipanin	3
3	Uppskot um broyting í starvsfólkaskipanini viðv. at hækka fráfaringaraldurin til 70 ár	4
4	Tilmæli frá mentanarnevndini í.s.v. umsókn frá TB fótbóltur um fíggjarligan stuðul	6
5	Mentanarnáttin 2019	7
6	Eftirmeting av Løgtingslóg um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m	8
7	Stuðulsumsókn - Lektiuhjálp í Tvøroyrar og Trongisvágs Skúla	8
8	Umsókn um matstovuloyvi, skeinkiloyvi og alment loyvi til SALT til ummælis	10
9	Umsókn um skrivstovuhøli	10
10	Leigubústaðir til kommunulæknaavloysarir	11
11	Leigumál við Sp/f bedingin - um lendið undir gomlu bedingini	12

Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Býráðið

Fundur nummar	13-2018
Fundardagur	10. september 2018 kl. 19:00
Fundarstaður	Býráðsskrivstovan

12	Víðkan av verandi kirkjugarði?	13
13	Samansjóvingarkvøld fyri borgarir og tilflytarir	13
14	Gerð av nýggjum leigusáttmála til Varðan Pelagic	14
15	Áheitan um eyka býráðsfund í samband við málið um bygningin við Sílá (gamla eldrasambýlið)	17
16	Fundarinnbjóðing frá Fiskimálaráðnum í samband við rokning frá MEST	18

Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Býráðið

Fundur nummar	13-2018
Fundardagur	10. september 2018 kl. 19:00
Fundarstaður	Býráðsskrivstovan

25.20.00-I00-1-18

1. Samanbering av skattatølum 2018

Málsfrágreiðing

Fíggjarnevndin, 6. september 2018, pkt. 1:
Borgarstjórin kunnar um skattainntøkurnar fyri august og fyri árið sum heild.

Avgerð

Borgarstjórin kunnar um skattainntøkurnar fyri august og fyri árið sum heild.

Skjøl

- Samanbering av skatti 2017-2018.xlsx
- Skattur 2018.xlsx

05.09.00-P21-1-08

2. Parkeringsskipanin

Málsfrágreiðing

Nevndin hevði vitjan av Jaspur Vang, syslumaður, og Oddur Dimon, parkeringsansari.

Tekniska nevnd, 3. maj 2018, pkt. 1:
Jaspur Vang, syslumaður, greiddi frá, at tað er ein avgerð hjá kommununi um har skal vera sonuparkering ella ikki.
Parkeringsansarin hevur heimild at geva bót allastaðni í býnum, fyri øll brot. Tað er ein spurningur um tað tænastustøðið kommunan velur at hava. Alvi Mortensen gjørdi vart við at har yvirhøvur er óskil í ferðsluni á Tvøroyri.
Jaspur Vang undraðist í, at tað ikki hevur fyri í ferðslunevndini, og mælti til at taka evnið upp.

Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvøravegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Býráðið

Fundur nummar	13-2018
Fundardagur	10. september 2018 kl. 19:00
Fundarstaður	Býráðsskrivstovan

Ferðslunevndin, 12. juni 2018, pkt. 1:
Nevndin mælir til, at avtaka sonuparkering í miðbýnum, taka skeltini niður, og avtaka skipanina við parkeringsvørði.
Tekniska Deild setir seg í samband við økisleiðaran hjá løgregluni, við atliti til góðkenning av tilmælinum.
Málið verður beint í býráðið.

5. september 2018 svarar Jaspur Vang, politikommisserur, í teldubrævi, at løgreglan tekur undir við tilmælinum um avtøku av sonuparkering.

Avgerð

Einmælt samtykt at avtaka sonuparkeringina.

Skjøl

- SV: Avtøka av parkeringsskipanini á Tvøroyri

81.00.00-A00-3-18

3. Uppskot um broyting í starvsfólkaskipanini viðv. at hækka fráfaringaraldurin til 70 ár

Samandráttur

Borgarstjórin hevur skotið upp at broyta §8 í starvsfólkaskipanini hjá Tvøroyrar Kommunu, ið er soljóðandi:

8. Fráfaringaraldur
Fráfaringaraldurin fyri starvsfólk hjá Tvøroyrar kommunu er 67 ár. Undantøk kunnu vera gjørd í serligum førum.

Eisini verður mælt til at broyta orðingina í §9 frá at vera "Frá fyri aldur" til at vera "Tá starvsfólk fara úr starvi".

Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Býráðið

Fundur nummar	13-2018
Fundardagur	10. september 2018 kl. 19:00
Fundarstaður	Býráðsskrivstovan

Málsfrágreiðing

Mentanarnevndin, 13. august 2018, pkt. 13:
Nevndin mælir til at broyta starvsfólkaskipanina soleiðis, at fráfaringaraldurin framvegis er 67 ár, men øll starvsfólk skulu hava møguleika at søkja um at vera í starvi til tey eru 70 ár.

Mentarnarnevndin mælir til, 15. august 2018, pkt. 12:

Fíggjarnevndin, 15. august 2018, pkt. 12:
Borgarstjórin mælir til at hækka fráfaringaraldurin til 70 eins og landið og fleiri kommunur hava gjørt, tó so, at um starvsfólk ynskir at fara frá við 67 ára aldur, kunnu tey tað.

Kristina Roest og Bjarni Hammer mæla til, at fráfaringaraldurin framvegis er 67 ár, men øll starvsfólk skulu hava møguleika at søkja um at vera í starvi til tey eru 70 ár. Mannagongdir verða gjørdar um, hvussu hetta skal praktiserast.

Býráðið, 20. august 2018, pkt. 5:
1. viðgerð av broyting í starvsfólkaskipanini hjá Tvøroyrar Kommunu:

Einmælt samtykt broyta starvsfólkaskipanina soleiðis, at fráfaringaraldurin framvegis er 67 ár, men øll starvsfólk skulu hava møguleika at søkja um at vera í starvi til tey eru 70 ár. Umsitingin skal kunna starvsfólk um hetta í góðari tíð áðrenn tey verða 67 ár.

Einmælt samtykt at broyta yvirskriftina í greinini tá fólk fara frá fyri aldur til "Tá starvsfólk fara úr starvi".

Avgerð

2. viðgerð av broyting í starvsfólkaskipanini hjá Tvøroyrar Kommunu:

Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Býráðið

Fundur nummar	13-2018
Fundardagur	10. september 2018 kl. 19:00
Fundarstaður	Býráðsskrivstovan

Einmælt samtykt broyta starvsfólkaskipanina soleiðis, at fráfaringaraldurin framvegis er 67 ár, men øll starvsfólk skulu hava møguleika at søkja um at vera í starvi til tey eru 70 ár. Umsitingin skal kunna starvsfólk um hetta í góðari tíð áðrenn tey verða 67 ár.

Einmælt samtykt at broyta yvirskriftina í greinini tá fólk fara frá fyri aldur til "Tá starvsfólk fara úr starvi".

Skjøl

- Rundskriv um fráfaringaraldur 70 ár FMR
- Teldupostur frá Klaksvíkar Kommunu
- Teldupostur frá Runavíkar Kommunu
- Teldupostur frá Fuglafjarðar Kommunu
- Teldupostur frá KAF
- Teldupostur frá Eystur Kommunu
- Dagførd og góðkend starvsfólkaskipan

20.00.00-I00-2-18

4. Tilmæli frá mentanarnevndini í.s.v. umsókn frá TB fótbóltur um fíggjarligan stuðul

Málsfrágreiðing

TB fótbóltur v/Henrik Thomsen, formanni, søkja um fíggjarligan stuðul í sambandi við kappingarárið 2018, íalt kr. 300.000,- líkasum undanfarin ár.

Mentanarnevndini viðgjørdi umsóknina frá TB á fundi tann 20. juni í ár, og gjørdi nevndin í hesum sambandi eitt tilmæli í málinum til støðutakan hjá býráðnum.

Mentanarnevndin, 20. juni 2018, pkt. 4:
Mentanarnevndin samtykti, at mæla býráðnum til, at játta TB fótbóltur kr. 300.000,- líkasum undanfarin ár við tí treyt, at kr. 75.000,- av játtaða stuðlinum verður oyramerktir til menning av ungdómsfótbóltinum í TB.

Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvøravegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Býráðið

Fundur nummar	13-2018
Fundardagur	10. september 2018 kl. 19:00
Fundarstaður	Býráðsskrivstovan

Býráðið, 20. august 2018, pkt. 2:
Einmælt samtykt at bjóða nevndini í TB á fund við býráðið áðrenn aðalfundin hjá TB.
Einmælt samtykt eisini at bjóða umboðum fyri stuðulsbólkin hjá TB á fund við býráðið.

Avgerð

Borgarstjórin mælir til at taka málið av skrá.

Alvi Mortensen mælir til at hava fund við TB, tí broytingar hava verið, síðan nevndin var á fundi við býráðið.

Einmælt samtykt at taka málið av skrá og bjóða nevndini í TB á fund.

Skjøl

- Umsókn um stuðul frá TB fótbóltur kappingarárið 2018
- Teldupostur frá Henrik Thomsen
- Roknskapur hja TB pr. 27.07.2018
- Roknskapur pr. 27.07.2018 fyri samstarvið TB/FCS/Royn
- Dagsordenspunkt: Umsókn um fíggjarligan stuðul frá TB fótbóltur behandlet på mødet 15. august 2018 kl. 08:30 (Býráðsskrivstovan) i Fíggjarnevndin (2018).docx
- Roknskapur til 25.08.2018

20.15.00-P00-2-18

5. Mentanarnáttin 2019

Avgerð

Súsanna Bertholdsen forkvinna í mentanarnevndini greiðir frá, at mentanarnevndin mælir til, at mentanarnáttin verður 31. mai í 2019.

Einmælt samtykt, at mentanarnáttin verður 31. mai 2019.

Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Býráðið

Fundur nummar	13-2018
Fundardagur	10. september 2018 kl. 19:00
Fundarstaður	Býráðsskrivstovan

00.24.00-A00-1-18

6. Eftirmeting av Løgtingslóg um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m

Málsfrágreiðing

Sosiala nevnd, 5. september 2018, pkt. 4:
Sum støðan er nú, sær nevndin bestu møguleikarnir í at halda áfram eftir núverandi leisti.

Avgerð

Borgarstjórin mælir til, at kommunal samstørv um eldraøkið ikki skulu vera ásett við lóg, men at kommununrnar kunnu skipa samstørv á økinum sjálvar ella vera einsamallar um eldraøkið, um tær ynskja tað.

Tilmælið frá borgarstjóranum einmælt samtykt.

Skjøl

- Løgtingslóg nr. 20 2014
- Fyrispurningur frá KF viðv. eldraøkinum

17.00.00-1-18

7. Stuðulsumsókn - Lektiuhjálp í Tvøroyrar og Trongisvágs Skúla

Málsfrágreiðing

Skúlastýrið í Tvøroyrar og Trongisvágs skúla søkir um fígging til, at lektiuhjálp kann setast á stovn í báðum skúlum í kommununi til komandi skúlaár 2018/19.

Mentanarnevndin, 20. juni 2018, pkt. 5:

Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Býráðið

Fundur nummar	13-2018
Fundardagur	10. september 2018 kl. 19:00
Fundarstaður	Býráðsskrivstovan

Mentanarnevndin samtykti, at taka undir við at skipa fyri lektiuhjálp í Tvøroyrar skúla í eina royndartíð, men mentanarnevndin samtykti eisini, at henda lektiuhjálp verður skipað væl. Mentanarnevndin ynskir at hava fund við leiðsluna í skúlanum áðrenn skipanin við lektiuhjálp verður sett í verk og áðrenn søkt verður eftir starvsfólkum.

Mentanarnevndin, 3. september 2018, pkt. 4:
Mælt verður til at ganga umsóknini frá skúlastýrinum á møti og stovna lektiuhjálp í Tvøroyrar og Trongisvágs Skúla, tó við 8 tímum um vikuna. mælt verður fíggja tilboðið við at flyta kr. 29.000 frá játtanini til stuðul til mentan.

Fíggjarnevndin, 6. september 2018, pkt. 4:
Nendin mælir einmælt til at ganga umsóknini frá skúlastýrinum á møti og stovna lektiuhjálp í Tvøroyrar og Trongisvágs Skúla, tó við 8 tímum um vikuna. mælt verður fíggja tilboðið við at flyta kr. 29.000 frá játtanini til stuðul til mentan.

Fígging

Lønarútreiðslurnar fyri lektiuhjálp í 2018 verða smb. hjálagda skjali uml. 36.000 kr. Í 2019 verða lønarútreiðslurnar uml. 101.000 kr.

Avgerð

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá mentanarnevndini og fíggjarnevndini og stovna lektiuhjálp í Tvøroyrar og Trongisvágs Skúla, tó við 8 tímum um vikuna. Einmælt samtykt at tilboðið verður fíggjað við at flyta kr. 29.000 frá játtanini til stuðul til mentan.

Skjøl

- Umsókn til mentanarnevndina.docx
- kostnaður av lektiucafé

22.01.01-G01-1-18

8. Umsókn um matstovuloyvi, skeinkiloyvi og alment loyvi til SALT til ummælis

Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Býráðið

Fundur nummar	13-2018
Fundardagur	10. september 2018 kl. 19:00
Fundarstaður	Býráðsskrivstovan

Málsfrágreiðing

Býráðið, 20. august 2018, pkt. 8:
Einmælt samtykt at beina málið í mentanarnevndina.

Mentanarnevndin, 3. september 2018, pkt. 6:
Mælt verður til at SALT fær loyvini, ið søkt verður um.

Fíggjarnevndin, 6. september 2018, pkt. 5:
Nevndin mælir einmælt til at SALT fær loyvini, ið søkt verður um.

Avgerð

Einmælt samtykt at mæla til, at SALT fær loyvini, ið søkt verður um.

Skjøl

- VS: Umsókn frá SALT
- Tekningar
- Umsókn

19.00.00-G01-1-18

9. Umsókn um skrivstovuhøli

Málsfrágreiðing

Mentanarnevndin, 3. september 2018, pkt. 14:
Anita Vibergsdóttir ynskir viðmerkt, at umboðið hjá Tvøroyrar kommunu í nevndini fyri Tvøroyrar Fornminnisfelag ikki var vitandi um, at fólk bleiv sett í verkætlanarstarv í bygdasavninum. Hetta heldur hon ikki vera rætt.

Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Býráðið

Fundur nummar	13-2018
Fundardagur	10. september 2018 kl. 19:00
Fundarstaður	Býráðsskrivstovan

Mælt verður til at ganga umsóknini frá Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavni á møti til kommunan tekur støðu til, hvat húsið skal brúkast til.

Fíggjarnevndin, 6. september 2018, pkt. 6:
Nevndin mælir einmælt til at ganga umsóknini frá Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavni á møti til kommunan tekur støðu til, hvat húsið skal brúkast til.

Avgerð

Einmælt samtykt til at ganga umsóknini frá Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavni á møti til kommunan tekur støðu til, hvat húsið skal brúkast til.

Skjøl

- Umsókn

82.03.00-Ø54-1-18

10. Leigubústaðir til kommunulæknaavloysarir

Málsfrágreiðing

Sosiala nevnd, 5. september 2018, pkt. 3:
Mælt verður til at fylgja tilmælinum frá teknisku deild, sí viðhefta skjal.

Fíggjarnevndin, 6. september 2018, pkt. 7:
Nevndin mælir einmælt til at taka undir við tilmælinum frá teknisku deild um at leiga bústaðin við Sílá 2 til bústað til kommunulæknaavloysarir.
Borgarstjórin ynskir, at eitt tíðarskeið fyri leigumálið verður ásett í sáttmálan.

Avgerð

Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Býráðið

Fundur nummar	13-2018
Fundardagur	10. september 2018 kl. 19:00
Fundarstaður	Býráðsskrivstovan

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá teknisku deild um at leiga bústaðin við Sílá 2 til bústað til kommunulæknaavloysarir, og at leigusáttmáli verður gjørdur fyri eitt ár í senn.

Skjøl

- Notat - Tekniska Deild
- Teldupostur frá kommunulæknaavloysara
- VS: Búðstad
- Hús til Kommunulæknan
- Skannað á kopimaskinuni á býráðsskrivstovuni

82.16.05-P27-1-13

11. Leigumál við Sp/f bedingin - um lendið undir gomlu bedingini

Málsfrágreiðing

Fíggjarnevndin, 6. september 2018, pkt. 9:
Nevndin mælir einmælt til at longja sáttmálan við Sp/f Bedingin við 5 árum.

Avgerð

Einmælt samtykt at longja sáttmálan við Sp/f Bedingin við 5 árum frá dags dato.

Skjøl

- Skriv frá Sp/f Bedingin
- Leigusáttmáli
- ískoyti til leigusáttmálan

04.31.10-G01-1-17

Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Býráðið

Fundur nummar	13-2018
Fundardagur	10. september 2018 kl. 19:00
Fundarstaður	Býráðsskrivstovan

12. Víðkan av verandi kirkjugarði?

Málsfrágreiðing

Tekniska nevnd, 3. september 2018, pkt. 10:
Nevndin mælir til, at fáa gjørt eina ætlan fyri avslutning av verandi kirkjugarð, og møguliga biðja uttanhýsis veitari koma við uppskoti. Atlit skal takast til atkomu, útsjónd og viðlíkahald.

Alvi Mortensen skýtir upp, at seta á stovn eina kirkjugarðsnevnd.

Avgerð

Bjarni Hammer kunnar um málið og at arbeitt verður víðari við hesum málinum í teknisku nevnd og teknisku deild.

20.15.00-P00-3-18

13. Samansjóvingarkvøld fyri borgarir og tilflytarir

Málsfrágreiðing

Mentanarnevndin, 3. september 2018, pkt. 12:
Forkvinnan greiðir frá, at hon hugsar eitt kvøld, har ein hoyrir um tær ymisku mentananar og t.d. hevu mat frá ymsum mentanum. Semja er um, at trivnaðarfólkið ger eitt uppskot til eitt tílíkt kvøld.

Avgerð

Súsanna Bertholdsen kunnar um ætlanirnar við at skipa fyri samansjóvingarkvøldið sum ein liður í einum integratiónspolitikki, ið arbeitt verður við.

82.16.05-P27-1-12

14. Gerð av nýggjum leigusáttmála til Varðan Pelagic

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Býráðið

Fundur nummar	13-2018
Fundardagur	10. september 2018 kl. 19:00
Fundarstaður	Býráðsskrivstovan

Málsfrágreiðing

Kunning í sambandi við gerð av nýggjum leigusáttmála fyri undirlendið undir Varðin Pelagic. Mælt verður til at lata Eyðbjørn Larsen, advokatur, gera eitt uppskot, ið verður lagt fyri nevndina aftur.

Fíggjarnevndin, 22. maj 2018, pkt. 3:
Fíggjarnevndin samtykti, at heita á Eyðbjørn Larsen, advokat, um at gera uppskot til ein leigusáttmála við Varðan Pelagic um undirlendið. Fíggjarnevndin viðmerkti, at tað hevur týdning, at tað í leigusáttmálanum verður greitt ásett, hvussu ognarviðurskiftini eru á havnarlagnum á Tvøroyri.

Býráðið, 22. maj 2018, pkt. 3:
Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini og geva Eyðbjørn Larsen advokat, heimild til at gera uppskot til leigusáttmála við Varðan Pelagic um undirlendið á havnarlagnum. Býráðið ynskti í hesum sambandi, at síggja "gamla" leigusáttmálan, tá nýggi leigusáttmálin skal góðkennast av býráðnum.

Tekniska deild mælir til, 4. september 2018, pkt. 3:
Seinast í grein 1 í leigusáttmálinum stendur:
" Tó kann eigarin, um sáttmálin verður hildin av leigaranum ,í fyrsta lagi siga leigumálið upp 1. januar 2048 at fara úr gildi 1. desember 2048"
VP ynskir at broyta hesa orðing soleiðis:
" Tó kann eigarin, um sáttmáli verður hildin av leigaranum, í fyrsta lagi siga leigumálið upp 1. desember 2047 at fara úr gildi 1. desember 2048"

Seinasti setningur í grein 2 í sáttmálanum vil VP hava broytt soleiðis:
"Leigan verður goldin árliga afturúr hvønn fyrsta januar. "

Vinnu- og havnanevnd, 4. september 2018, pkt. 3:
Nevndin tekur undir við broytingini til 1. desember 2047, men heldur at leigan skal gjaldast árliga forút hvønn fyrsta januar.

Bogi Johannesen mælir til at góðkenna sáttmálan.
Alvi Mortensen tekur støðu tá ið málið kemur fyri í býráðnum.

Málið verður beint í Fíggjarnevndina.

Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Býráðið

Fundur nummar	13-2018
Fundardagur	10. september 2018 kl. 19:00
Fundarstaður	Býráðsskrivstovan

Fíggjarnevndin, 6. september 2018, pkt. 8:
Nevndin mælir einmælt til at broyta uppskotið til sáttmálan soleiðis, at leigan verður goldin hálvárliga forút til 1. januar og 1. juli.

Nevndin ynskir neyvari frágreiðing viðv. §3, stk. 3 og §8, stk 1 og 2. Nevndin ynskir eisini at síggja eitt kort yvir økið, sum verður víst til í leigusáttmálanum.

Kristina Roest ynskir viðmerkt í gerðabókina, at hon ynskir at síggja galdandi leigusáttmála fyri matr.nr. 493a.

Borgarstjórin ynskir viðmerkt í gerðabókina, at matr.nr. 493b er til viðgerðar nú. Kommunala eftirlitið hevur biðið um at fáa innlit í leigusáttmálan um 493a og tað verður svarað innan freistina, ið er 12. september.

Fíggjarnevndin er samd um at hava ein stuttan fund áðrenn býráðsfundin 10. septembur kl. 19.

Fíggjarnevndin, 10. september 2018, pkt. 1:
Nevndin mælir einmælt til at gera hesar broytingar í uppskotinum til sáttmála:

Broyting í innleiðandi tekstinum:

„øki av havnarognini hjá Tvøroyar kommunu, sum er skrásett sum matr. nr. 493b Froðba-Tvøroyri, havnalagið 9 og 11, 800 Tvøroyri, og sum er 13.xxx fermetrar til víddar, sambært hjálagda kortskjali, dagfest xx. 2018."

broytast til:

„øki av havnarognini hjá Tvøroyar kommunu, sum er skrásett sum matr. nr. 493b Froðba-Tvøroyri, havnalagið 11, 800 Tvøroyri, og sum í løtuni er uml. 13.000 fermetrar til víddar, sambært hjálagda vegleiðandi kortskjali, dagfest xx. 2018."

Í §2: Leigan verður goldin forút hálvársliga hvønn 1. januar og hvønn 1. juli.

Í §3, stk.3 verður brotið frá "At gevast við....." strikað reglubrotið út.

Í §5, stk 4 verður síðsta linjan um forkeypsrætt strikað.

Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Býráðið

Fundur nummar	13-2018
Fundardagur	10. september 2018 kl. 19:00
Fundarstaður	Býráðsskrivstovan

Stk. 2 í §8 verður flutt undir §3 sum síðsta brot, og stk 1 í §8 verður strikað. Sostatt verður §9 til §8 og leypandi til og við §12, ið verður til §11.

Avgerð

Einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum til sáttmála við hesum broytingum:

Broyting í innleiðandi tekstinum:

„øki av havnarognini hjá Tvøroyar kommunu, sum er skrásett sum matr. nr. 493b Froðba-Tvøroyri, havnalagið 9 og 11, 800 Tvøroyri, og sum er 13.xxx fermetrar til víddar, sambært hjálagda kortskjali, dagfest xx. 2018."

broytast til:

„øki av havnarognini hjá Tvøroyar kommunu, sum er skrásett sum matr. nr. 493b Froðba-Tvøroyri, havnalagið 11, 800 Tvøroyri, og sum í løtuni er uml. 13.000 fermetrar til víddar, sambært hjálagda vegleiðandi kortskjali, dagfest xx. 2018."

Í §2: Leigan verður goldin forút hálvársliga hvønn 1. januar og hvønn 1. juli.

Í §3, stk.3 verður brotið frá "At gevast við....." strikað reglubrotið út.

Í §5, stk 4 verður síðsta linjan um forkeypsrætt strikað.

Stk. 2 í §8 verður flutt undir §3 sum síðsta brot, og stk 1 í §8 verður strikað. Sostatt verður §9 til §8 og leypandi til og við §12, ið verður til §11.

Skjøl

- 99999992.docx
- SV: Leigusáttmálin m. Tvøroyarar kommunu og Varðan Pelagic enn einferð
- Skriv til Tvøroyar kommunu viðv. broyting til uppskot til leigusáttmála.pdf
- Kort_matr_nr_493b
- Leigusáttmálin hjá VP - enn einaferð

Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Býráðið

Fundur nummar	13-2018
Fundardagur	10. september 2018 kl. 19:00
Fundarstaður	Býráðsskrivstovan

27.00.00-A00-1-16

15. Áheitan um eyka býráðsfund í samband við málið um bygningin við Sílá (gamla eldrasambýlið)

Málsfrágreiðing

Sosiala nevnd, 5. september 2018, pkt 8:
Forkvinnan ynskir viðmerkt í gerðabókina, at hon hevur ikki sett hetta málið á skránna. Borgarstjórin hevur biðið um at fáa tað á skránna hjá sosialu nevnd. Tað var ikki nakað nýtt tilfarð frá borgarstjóranum hjá nevndini at viðgera.

Hon vísir á, at málið hevur verið í nevndini fyrr. Meirilutin í býráðnum hevur nú biðið um at fáa ein eykabýráðsfund um hetta málið, tí tey ynskja ikki, at bygningurin verður seldur til annað endamál.

Forkvinnan ynskir viðmerkt í gerðabókina, at hon hevur ráðført seg við Mikkjal Sørensen, formann í stýrinum fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy, ið smb. henni hevur sagt, at tað er ein katastrofa, um sambýlið gleppur okkum av hondum.

AV ynskir viðmerkt, at síðst hetta málið var á skrá í sosialu nevnd var í novembur í 2017. Hon heldur tað vera løgið, at biðið verður um eyka býráðsfund,uttan at málið hevur verið fyri í sosialu nevnd aftur.

Forkvinnan metti ikki, tað var neyðugt at hava málið fyri sosialu nevnd aftur, tá tað hevur verið til viðgerðar í nevndini fyrr.

Avgerð

Bjarni Hammer mælir til, at umsitingin tekur upp samband við eigararnar av bygninginum við Síla við atliti til at gera ein leigusáttmála, um so er at formaðurin í stýrinum fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroynni ikki finnur eina loysn.

Borgarstjórin mælir til, at Bú- og Heimatænastan í Suðuroy arbeiðir víðari við málinum. Hann metir, tað vera beinleiðis brot á lógina um eldraøkið, um ein kommuna fer inn og ger leigusáttmálar ella keypir bygningar uttan um Bú- og Heimatænastuna í Suðuroynni.

Anita Vibergsdóttir viðmerkir, at málið hevur ikki verið á skrá í sosialu nevnd í alt ár. Hon heldur tað vera undrunarvert, at tað ikki er viðgjørt har. Hon heldur, tað eigur at vera viðgjørt har, áðrenn tað verður lagt fyri býráðið.

Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Býráðið

Fundur nummar	13-2018
Fundardagur	10. september 2018 kl. 19:00
Fundarstaður	Býráðsskrivstovan

Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá borgarstjóranum: tríggjar atkvøður fyri, fýra atkvøður ímóti, Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu fyri. Bjarni Hammer, Annika Pearce, Súsanna Bertholdsen og Anfinn Leo atkvøddu ímóti. Tilmælið er fallið.

Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá Bjarna Hammer: Fýra atkvøður fyri, tríggjar atkvøður ímóti: Bjarni Hammer, Annika Pearce, Súsanna Bertholdsen og Anfinn Leo atkvøddu fyri, Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu ímóti. Tilmælið samtykt.

Borgarstjórin viðmerkir, at hann fera at seta seg í samband við Kommunala Eftirlitið viðv. um heimild er til at gjøgnumføra samtyktina hjá meirilutanum.

Anita Vibergsdóttir viðmerkir, at hon er ikki ímóti at fáa eitt sambýlið á Tvøroyri, men hon er ímóti mannagongdini í hesum málinum.

Alvi Mortensen viðmerkir, at hann er ímóti at býráðið áleggur borgaranum á Tvøroyri eina óneyðuga útreiðslu, uttan at vita, hvat tað førir til, tí tað eru alt ov nógvir leysir endar í málinum. Hann ynskir staðiliga, at allir borgarir í Tvøroyrar Kommunu fáa tær sømdir, teir eiga, eisini teir eldru.

Skjøl

- Áheitan um eyka býráðsfund

14.00.00-Ø00-1-18

16. Fundarinnbjóðing frá Fiskimálaráðnum í samband við rokning frá MEST

Avgerð

Einmælt samtykt at brúka fyritøkuna Tiljar sum ráðgeva í samband við hendan fundin. Býráðið fær kunning, tá fundurin hevur verið.

Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Býráðið

Fundur nummar	13-2018
Fundardagur	10. september 2018 kl. 19:00
Fundarstaður	Býráðsskrivstovan

Bók lisin **Fundur lokin**

Kristin Michelsen: _____

Bjarni Hammer: _____

Anita Vibergsdóttir: _____

Annika Pearce: _____

Alvi Mortensen: _____

Kristina Roest: _____

Súsanna Bertholdsen: _____

Anfinn Leo: _____

10. september 2018

Formansváttan